UTTAN ÚR HEIMI

## Sleppa ikki at stevna

Ein dómstólur í New York hevur gjørt av, at avvarðandi hjá nøkrum teirra, sum doyðu í atsóknini 11. september í 2001, sleppa ikki at leggja sak ímóti saudi-arabisku myndugleikunum.

Tey, sum ætlaðu at legja málið fyri dómsvaldið, vilja vera við, at yvirgangsfelagskapurin al-Qaeda hevur fingið pengar og annan stuðul frá saudiarabisku stjórnini. Ætlanin var at stevna saudiarabiska verjumálaráðharanum og saudiarabiska sendiharranum í London, men New York District Court sigur í sínari niðurstøðu, at ráðharrin og sendiharrin eru vardir av órini í hesum førinum.

Sambært sakførara-num Justin Gren høvdu fleiri avvarðandi ætlanir um at reisa tilsvarandi sakarmál ímóti saudi-arabiskum leiðarum og diplomatum, men tað verður helst av ongum, nú rætturin í New York hevur víst tí fyrsta málinum frá sær, sigur hann við tíðindastovuna AP.

## Mintust vanlukku

Mikudagin var eitt ár liðið, síðani farmaskipið norska "Rocknes" holvdist í Vatnestraumen nærhendis Bergen, og í tí sambandi varð skipað fyri minningarhaldi á staðnum.

Skipað varð soleiðis fyri, at tvey skip hjá norsku sjóverjuni, "Andenes" og "Ålesund", sigldu á staðið, har "Rocknes" holvdist. Nakrir av teimum, sum sluppu livandi frá vanlukkuni, vóru umborð á umborð á øðrum skipinum saman við avvarðandi hjá teimum, sum doyðu, bjargingarfólki og almennum umboðum, og tey fingu høvi at tveita blómur og kransar á sjógvin. Eftir at nøkur kirkjuumboð høvdu sagt nøkur orð, bleiv ringt tríggjar ferðir við skipsklokkuni.

"Rocknes" holvdist klokkan hálvgum fimm seinnapartin tann 19. januar í fjør. Vanlukkan kravdi 18 mannalív.

## Fleiri gloymdar kreppur

Felagsskapurin Læknar Uttan Landamark fegnast um tann stóra stuðulin til tey flóðalduraktu londini í Suðurasia, men sigur seg samstundis harmast um, at altjóða samfelagið hevur so lætt við at gloyma aðrar kreppur.

Eitt nú vísir felagsskapurin á tær óloystu kreppurnar í Uganda, Kolombia, Kekenia, Dominikanska Lýðveldinum, Somalia og aðrastaðni. Sagt verður, at líðingarnar í hesum kreppuraktu økjunum eru øðiligar, men at lítið verður gjørt fyri at loysa tær. Í hesum sambandi finst felagsskapurin at USA, tí teir amerikonsku fjølmiðlarnir gera so lítið burtur úr hesum kreppunum.

Læknar Uttan Landamark siga í einari nýggjari frágreiðing, at altjóða fjølmiðlarnir gera lítið burturúr, at fólk í Etiopia líða undir støðugum hungri, og at myndugleikarnir í Burundi skilja tey fátækastu burturúr, soleiðis at tey fáa ikki atgongd til tað almenna heilsuverkið.

## Vil hava meiri burturúr

Líka síðani norðmenn fóru at vinna olju upp úr undirgrundini, hava oljufeløgini lagt seg eftir at menna útgerðina, so tey kunnu fáa sum mest úr hvørjum brunni, men nú krevur oljumálaráðið, at tey skulu fáa uppaftur meiri burturúr.

Oljufeløgini halda, at sum er verða umleið 50 prosent av oljuni tikin upp úr brunnunum, men Thorhild Widvey, oljumálaráðharri, boðaði fyrradagin frá, at hon vil hava uppaftur meiri. Hon hevur tí biðið oljumálaráðið kanna, um myndugleikarnir skulu seta feløgunum størri krøv, skrivar Bergens Tidende,. sum veit at siga, at á 30 leiðum hava feløgini longu gjørt av at royna at fáa meiri burtur úr hvørjum brunni.

Roknað verður við, at íløgurnar á norska landgrunninum verða einar 90 milliardir norskar krónur í ár. Ætlanin er at bora ímillum 30 og 40 nýggjar brunnar, og tað er tvær ferðir meiri enn í fjør.

# Triði hvør veljari hevur ikki tikið støðu

**Nógvir danskir veljarar hava ikki gjørt av, hvar krossurin skal setast, og tað verða teir, sum avgera valið 8. februar**

FÓLKATINGSVAL

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Allar veljarakanningar benda á, at stjórnin hjá Anders Fogh Rasmussen verður sitandi aftan á valið 8. februar, men tað merkir als ikki, at valið er avgjørt.

Fleiri valserfrøðingar, sum Kristeligt Dagblad hevur tosað við, vísa á, at tað eru framvegis meiri enn 30 prosent av veljarunum, sum ivast í, hvar tey fara at seta krossin tann dagin, tey standa í valhølinum.

– Í 1998 tóku 26 prosent av veljarunum ikki støðu fyrr enn undir valstríðnum, og á valinum í 2001 vóru tað 29 prosent, sum ikki tóku støðu fyrr enn tá, sigur Karina Pedersen, valgranskari á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, við Kristeligt Dagblad. Ein annar valgranskari, Lars Hovbakke Sørensen á lærda háskúlanum í Århus, sigur við blaðið, at sjálvt tað minsta mistakið hjá valevnunum kann fáa veljararnar at broyta støðu, og tí bíða fleiri við at taka ta endaligu avgerðina um, hvar tey skulu seta krossin.

Hans Jørgen Nielsen, lektari í statsvísindi á lærda háskúlanum í Keypmannahavn, heldur, at valstríðið hjá flokkunum hevur einans til endamáls at ávirka tey seinastu 30 prosentini, sum framvegis ivast í, hvønn tey skulu velja.

Tær nýggjastu veljarakanningarnar geva framvegis stjórnarsamgonguni greiðan meiriluta í Fólkatinginum. Sambært Gallup fáa Vinstri, Tey Konservativu og Danski Fólkaflokkurin 93 tinglimir, ein kanning hjá Cartinets gevur teimum 95 tinglimir, og sambært Vilstrup fáa teir tríggir flokkarnir heili 97 umboð.

Kanningarnar geva Vinstra ímillum 58 og 60 tingsessir og Sosialdemokratunum ímillum 47 og 52. Seinast fekk Vinstri 56 fólkatingsumboð og Sosialdemokratarnir 52.

# Einki lív á Titan



*Landslagið á Titan líkist landslagnum ymsastaðni á Jørðini, men har er einki lív*

*Mynd: Reuters*

**Myndirnar, sum rúmdarfarið "Huygens" tók av Titan, vísa, at har er einki lív**

RÚMDIN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í tveir tímar megnaði "Huygens" at taka myndir og at senda tær niður á Jørðina. So slóknaði rúmdarfarið.

Enn hava granskararnir bara kannað ein part av myndunum, sum eftir øllum at døma vísa, hvussu tað kann hava sæð út á Jørðini fyri umleið fýra milliardum árum síðani. Á myndunum sæst, at ein ella onnur væta hevur runnið í áum á mánanum, men hetta kann ikki hav verið vatn, tí tað frystir 179 stig á Titan. Men tað sigur eisini, at har er heldur einki lív - í hvussu er ikki omaná, sigur norski granskarin Bo Andersen við Aftenposten.

Titan hevur atmosferu eins og Jørðin, og granskararnir kanna nú ljóðupptøkur, sum "Huygens" gjørdi á veg niður ígjøgnum atmosferuna. Bo Andersen sigur, at suðið frá rúmdarfarinum hoyrist væl á upptøkunum, og tær vísa eisini, at tað var eitt lot, tá farið setti seg, sigur hann.

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við